# HEIMSYVIRLÝSINGIN

## - við spurningum til umhugsan og kjak

Hetta tilfarið er ætlað eldru næmingunum. Til hvørja grein eru spurningar, sum næmingarnir kunnu hugsa og kjakast um.

Ávísar greinar kunnu veljast út ella greinarnar kunnu býtast millum næmingarnar.

**G.G. Tað hevur týdning, at gera greitt fyri næmingunum, at øll rættindini hanga saman, og at tey ikki kunnu raðfestast. Tí skal altíð eisini vísast til alla heimsyvirlýsingina, tá einstakar greinar verða umrøddar. (Rættindini eru sínamillum tengd (interdependence).**

### 1. GREIN: JAVNRAETTINDI

***ØLL MENNISKJU ERU FØDD FRÆLS OG JØVN TIL VIRÐINGAR OG MANNARÆTTINDI. TEY HAVA SKIL OG SAMVITSKU OG EIGA AT FARA HVØRT UM ANNAÐ Í BRÓÐURANDA.***

A. Hvussu heldur tú orðini „jøvn til virðingar“ skulu skiljast?

Á. Jøvn til virðingar merkir ikki tað sama sum javnrættur. Hvat merkja hesi hugtøk veruliga?

B. Hevda verður, at ein ofta má gera missmun fyri at vinna einstaklingum og samfelagsbólkum, rættvís kor og viðurskifti. Roynið og finnið so mong dømi sum gjørligt, har tað er neyðugt, at gera mismun fyri at vinna rættvísi.

D. Greinið hugtøkini „frælsur“ og „frælsi“ við atliti at hesi grein.

### 2. GREIN: RAETTVÍS VIÐFER

***ØLL HAVA KRAV UM RÆTTINDI OG FRÆLSI, SUM ERU NEVND Í HESI YVIRLÝSING, UTTAN MUN TIL ÆTTARSLAG(RASU), HÚÐARLIT, KYN, MÁL, ÁTRÚNAÐ, POLITISKA ELLA AÐRA SANNFØRING, TJÓÐSKAPARLIGAN ELLA SAMFELAGSLIGAN UPPRUNA, OGNARVIÐURSKIFTI, FØÐING ELLA AÐRA STØÐU. SOMULEIÐIS SKAL EINGIN MISMUNNUR VERA ORSAKAÐ AV POLITISKARI, RÆTTARLIGARI ELLA MILLUMTJÓÐA STØÐU HJÁ TÍ LANDI, SUM EIN PERSÓNUR HOYRIR TIL, SAMA UM LANDIÐ ER SJÁLVSTØÐUGT, UNDIR TILSJÓNARVALDI, ELLA FULLVELDI TESS Á ANNAN HÁTT ER SKERT.***

A. Skiftið orð um okkara hugburð um minnilutar. Finnið dømi um tað í bløðum, útvarpi, sjónvarpi. Hvussu fer hetta fram í tykkara egna gerandisdegi?

## 3. GREIN: RÆTTUR TIL LÍV

### *EIN OG HVØR HEVUR RÆTT TIL LÍV, FRÆLSI OG PERSÓNLIGA TRYGD*

A. Hvat merkir, at tú hevur „rætt til persónliga trygd“?

Á. Vísið á dømi, har rætturin til lív ikki verður virdur.

B. Skiftið orð um deyðarevsing við atliti at hesi grein.

## 4. GREIN: TRÆLAHALD

### *EINGIN SKAL LIVA Í TRÆLDÓMI ELLA TRÆLKAN; TRÆLDÓMUR OG TRÆLAHANDIL AV ØLLUM SLAG SKULU VERÐA BANNAÐ*

A. Trælahald er avtikið við lóg í øllum londum. Kortini verða keypt og seld børn ólógliga til ættleiðing, skøkjulevnað og arbeiði. 50 milliónir børn undir fermingaraldur (14 ár) verða brúkt sum bílig arbeiðsmegi nú á døgum. Hvussu kunnu vit forða fyri, at børn verða missnýtt soleiðis?

Á. Í mongum evropeiskum londum búgva og arbeiða fólkasløg úr fjarskotnum londum, kor teirra eru mangan lík trælakorum. Vitið, um tit kunnu vísa á, at tílíkt er.

## 5. GREIN: PÍNING

### *EINGIN SKAL VERÐA PÍNDUR ELLA HARÐLIGA, ÓMENNISKJALIGA ELLA VANÆRULIGA VIÐFARIN ELLA REVSAÐUR*

A. Fólk fest eru einmælt samd um, at tey halda píning vera andstyggiliga. Men hvat er píning?

Á. Vitið, um tit kunnu skriva nøkur sjónarmið upp, har ið grundgivið verður fyri og ímóti píning. Setið tey upp hvørt ímóti øðrum. Hvørji úrslit koma tit til?

B. Eru dømi um, at píning kann góðtakast? Hvussu mikið kunnu tit góðtaka? Eru tit samd?

D. Hava vit dømi um píning í Føroyum? T.d. tá fólk verða koyrd í avbyrging í varðhaldinum - er tað píning?

## 6. GREIN: SOMU LÓGARRÆTTINDI

### *ØLL HAVA RÆTT TIL AT VERÐA VIÐURKEND SUM PERSÓNAR FYRI LÓGINI.*

A. Øll hava rætt til at fáa sakarmál sítt fyri dómstól. Hvat kann møguliga verða til bága fyri, at tað ikki verður játtað fólki?

B. Hvørji rættindi hevur ein persónur, sum verður varðhaldsfongslaður?

## 7. GREIN: JØVN FYRI LÓGINI

### *ØLL ERU JØVN FYRI LÓGINI OG HAVA RÆTT TIL SOMU RÆTTARVERND UTTAN MISMUN. ØLL HAVA SAMA RÆTT AT VERÐA VARD FYRI MISMUNI, SUM ER BROT MÓTI HESI SAMTYKT, OG AT VERÐA VARD FYRI ALLARI EGGJAN TIL AT SKAPA TÍLÍKAN MISMUN*

A. Hvat verður meint við, tá ið sagt verður, at „Øll eru líka fyri lógini»?

Á. Eru øll líka fyri lógini í Føroyum? Grundgevið svarini við dømum.

## 8. GREIN: ØLL EIGA AT FÁA RÆTTARHJÁLP

***UM ONKUR FÆR VIÐFERÐ, SUM ER TVØRTUR ÍMØTI TEIMUM GRUNDRÆTTINDUM, SUM HONUM ERU TRYGGJAÐ SAMBÆRT GRUNDLÓG OG ØÐRUM LANDSLÓGUM, SKAL HANN HAVA RÆTT TIL AT FÁA FULLAR SØMDIR AFTURFYRI VIÐ DÓMSTÓLAR LANDSINS***

A. Rættarskipan landsins eigur at veita okkum skjóta hjálp og verju. Eru hesi grundrættindi tryggjað í Føroyum ?

Á Vita tit dømi um, at fólk í øðrum londum lítla ella onga hjálp og vernd kunnu vænta sær av landsins rættarskipan?

B. Hví veitir rættarskipanin í summum londum borgarunum ikki ta hjálp, teir eiga at fáa?

## 9. GREIN: TILVILDARLIG HANDTØKA

***EINGIN SKAL VERÐA TILVILDARLIGA HANDTIKIN, SETTUR Í VARÐHALD ELLA GJØRDUR ÚTLAGIN.***

A. Eingin skal verða settur í varðhald uttan um lóg og dóm.

Á. At verða handtikin tilvildarliga og settur í fongsul uttan rættargongd er vanligur táttur í mongum londum. Vísið á dømi.

B. Vita tit um lond, sum gera fólk útlagin? Hví munnu fólk verða revsað soleiðis?

## 10. GREIN: RÆTTVÍS RÆTTARVIÐGERÐ

***ØLL HAVA SANNAN JAVNRÆTT TIL RÆTTVÍSA OG ALMENNA RÆTTARVIÐGERÐ FYRI ÓHEFTUM OG ÓVILDIGUM DÓMSTÓLI, SUM SKAL TAKA AVGERÐ UM RÆTTINDI TEIRRA OG SKYLDUR, OG UM ØLL REVSIMÁL, IÐ VERÐA REIST***

A. Óvildugt og óheft nevningating skal virka við dómstólar. Hvat er nevningating, og virkar tað sum ætlað? Kunnu veikleikar verða við hesi skipan?

Á. Fjølmiðlar umrøða ofta brotsmál og onnur lógarbrot. Hvørja ávirkan kann tað hava á sakarmálsins rættarviðgerð? Leitið eftir dømum, har fjølmiðlaumrøða hevur verið til bága ella fyrimunar fyri partarnar.

## 11. GREIN: ALMENN RÆTTARGONGD

***1. HVØR, SUM VERÐUR ÁKÆRDUR FYRI REVSIVERDAGERÐ, EIGUR RÆTT TIL AT VERÐA METTUR ÓSEKUR, INNTIL HANN ER DØMDUR SEKUR VIÐ ALMENNARI RÆTTARGONGD, HAR SUM HANN HEVUR FINGIÐ FULLA TRYGD FYRI VERJU.***

*2. EINGIN SKAL VERÐA FUNNIN SEKUR Í REVSIMÁLI AV NØKRUM SLAG, UTTAN SO AT GERÐ ELLA ÁBYRGDARLOYSI, SUM HANN VARÐ ÁKÆRDUR FYRI, ER AT ROKNA SUM BROTSGERÐ SAMBÆRT LANDSLÓGUM ELLA ALTJÓÐA LÓGUM, TÁ IÐ GERÐIN VARÐ FRAMD. EI HELDUR SKAL STRANGARI REVSING VERÐA ÁSETT ENN HON, IÐ VAR GALDANDI, TÁ IÐ TANN REVSIVERDAGERÐIN VARÐ FRAMD.*

A. Rættargongd skal vera almenn. Hví er tað ein týdningarmikil grundregla?

Á. Vit hava rætt til at verða mett ósek, inntil tað øvuta er prógvað. Virkar hetta í roynd og veru?

B. Hevur nakar tykkara onkuntíð verið fyri, at verið dømdur „frammanundan“? Greiðið frá.

D. Vita tit um sakarmál, har ið ákærdi er dømur frammanundan?

Ð. Eru sakarmál, har ið dómsvigerðin er fyri læstum durum? Hví? Finnið dømi.

E. 2. stykkið sigur, at eingin lóg má hava afturvirkandikraft. Hvussuleiðis skal hetta skiljast? Halda tit hetta verða rætt? Hvussu var t.d. undir rættar uppgerðini eftir seinna heimsbardaga, í Noregi, Danmark og í Núrnbergi?

## 12. GREIN: EINSTAKLINGAVERND

*EINGIN EIGUR AT VERA FYRI TILVILDARLIGARI UPPÍLEGGING Í PERSÓNLIG VIÐURSKIFTI, HEIMALÍV ELLA BRÆVASKIFTI, EI HELDUR FYRI ÆRUSKEMD ELLA ÚTSPILLING. ØLL EIGA RÆTT TIL LÓGARVERND FYRI SLÍKARI UPPÍLEGGING ELLA ÁGANGI.*

A. Í stuttum veitir henda grein okkum rætt til egna trygd. Einstaklingurin skal verjast fyri húsarannsóknum, at brøv vera latin upp av øðrum, telefonsamrøðum og ærumeiðing o.ø. Kann gerast neyðugt at bróta henda sjálvsagda rætt? Grundgevið fyri hesum ella vísið á dømi, har hetta verður gjørt.

Á. Hugsið um dátaeftirlit í sambandi við hesa grein. Hvørjar reglur eiga at galda viðvíkjandi fólkayvirliti/eftirliti og persónstølum? Hvørji fólkayvirlit eru ráðilig at nýta, og hvørji eiga at verða strikað?

## 13. GREIN: FERÐA- OG BÚSETINGARFRÆLSI

*1. ØLL HAVA RÆTT TIL FRÍTT AT FARA OG BÚSETAST INNANFYRI LANDAMARK Í HVØRJUM RÍKI SÆR.*
*2. ØLL HAVA RÆTT TIL AT FARA AV LANDINUM, HVØRJUM SUM ER, EISINI SÍNUM EGNA OG AT FARA HEIMAFTUR TIL SÍTT LAND.*

A. Helst Suðurafrika hevði órímiliga strangar búsetingarlógir. Hvussu vóru hesar lógir? Vita tit onnur dømi um slíkar búsetingarlógir úr fortíðini ella nútíðini?

Á. Eru onnur lond, sum bróta viðtøkurnar í 2. stykki í hesi grein?

## 14. GREIN: RÆTT TIL FRIÐSKJÓL

***1. UM VIT ÓTTAST FYRI AT VERÐA ILLA VIÐFARIN Í HEIMLANDI OKKARA, HAVA VIT ØLL RÆTT TIL AT FLÝGGJA TIL ANNAÐ LAND FYRI AT VERA TRYGG.***
***2. SLÍKAN RÆTT BER TÓ IKKI TIL AT SKJÓTA SEG UNDIR, TÁ IÐ TALAN AV RØTTUM ER FYRI ÓPOLITISKAR BROTSGERÐIR ELLA GERÐIR, SUM ERU ÍMÓTI ENDAMÁLUM OG GRUNDREGLUM SAMEINDU TJÓÐANNA.***

A. Hvørjar altjóða viðtøkur eru galdandi fyri at søkja friðskjól í einum landi?

Á. Hvørjar lógir galda í Føroyum/Danmørk? Hvat halda tit um okkara lógir? Hvussu verða lógirnar framdar í verki?

B. Berið saman føroyskar/danskar lógir við altjóða viðtøkurnar um friðskjól.

## 15. GREIN: TJÓÐSKAPARRÆTTUR

***1. ØLL HAVA TJÓÐSKAPARRÆTT.***
***2. EINGIN SKAL TILVILDARLIGA MISSA SÍN TJÓÐSKAP, OG ONGUM SKAL VERÐA SÝTT FYRI AT SKIFTA TJÓÐSKAP***

A. Hvat merkir tað ongan tjóðskaparrætt at eiga? Eru tjóðir, sum ongan tjóðskaparrætt eiga? Hví eiga tey hann ikki, ella hví er hann tikin av teimum?

Á. Hvat merkir tað at eiga ríkisborgararætt? Hvørji rættindi og hvørjar skyldur eru knýttar afturat hesum rætti? Hvønn kensluligan týdning hevur hesin rættur?

## 16. GREIN: HJÚNABANDSRÆTTINDI

***1. MENN OG KVINNUR, SUM ERU KOMIN TIL LÓGALDUR, SKULU UTTAN MUN TIL ÆTTARSLAG (RASU), TJÓÐSKAPELLA ÁTRÚNAÐ HAVA RÆTT AT GIFTAST OG SETAST ÍBÚGV. TEY HAVA KRAV UM JAVNRÆTTINDI AT GIFTAST, Í HJÚNALAGNUM OG TIL HJÚNASKILNAÐ.***
***2. HJÚNABAND KANN IKKI VERÐA BUNDIÐ, UTTAN BÁÐIR PARTAR SAMTYKKJA Í TÍ AV FRÍUM VILJA.***
***3. HÚSKIÐ ER TANN NATÚRLIGA FRUMEINDIN Í SAMFELAGNUM OG HEVUR RÆTT TIL VERND AV SAMFELAGOG LANDI.***

A. Mentanar- og stjórnmálaviðurskifti hava tíðum við sær, at trupult er hjá fólki at giftast og seta búgv. Hvørjar reglur og hvørjir siðir eru galdandi eitt nú í India, Iran, Irak og Japan?

Á. Galda avmarkingar í Norðurlondum, tá ið fólk ganga saman í hjúnalag/flyta saman at búgva/flyta inn í sambýli? Hvønn týdning hevur okkara hugburður í sambandi við, at fólk vilja liva saman soleiðis, sum tey velja at gera?

B. Greinin er merkt av at vera skrivað í fjørutiárunum. Hvussuleiðis?

### 17. GREIN: OGNARRÆTTUR

***1. ØLL HAVA RÆTT TIL AT EIGA OGN, ANNAÐHVØRT EINSAMØLL ELLA Í FELAG VIÐ ONNUR.***
***2. EINGIN SKAL HISSINI VERA FYRI OGNARTØKU.***

A. 17. grein er í fyrsta viðbragdi eyðskild og sjálvsøgd.
Men eigur ognarrætturin altíð at verða vardur?
Nær halda tit, at ríkisvaldið kann ognartaka ogn hjá fólki?

Á. Ognarviðurskifti hava mangan verið høvuðsstríðið millum stjórnir, stættir, og jarðaránarar. Finnið dømi um tað.

B. Hvør eigur jørðina í Føroyum?
Hvørjar avleiðingar hevur tað?

D. Í hesum brotum, sum eru úr røðum, sum norðuramerikanskir indiánar hava hildið fyri hvíta manninum, verða ognarviðurskifti umrødd alt øðrvísi.
Hvussu?
Hvat halda tit um tað?

### 18. GREIN: TRÚARFRÆLSI

***ØLL HAVA RÆTT TIL HUGSANAR-, SAMVITSKU- OG TRÚARFRÆLSI. HESIN RÆTTUR FATAR EISINI UM FRÆLSI AT SKIFTA ÁTRÚNAÐ ELLA TRÚGV, OG FRÆLSI TIL ANNAÐHVØRT EINSAMALLUR ELLA Í FELAG VIÐ ONNUR OG ALMENT ELLA EINSKILT AT INNA TRÚGV SÍNA Í FRÁLÆRU, TILBIÐING,GUDSTÆNASTU OG HALGIHALDI.***

A. Í hvørjum londum er ríkiskirkja ella ríkisátrúnaður? Gerið eitt yvirlit.

Á. Hvørjar avleiðingar hevur tað fyri alment virksemi, til dømis fyri skúlan?

B. Í Føroyum er fólkakirkja. Halda tit, hetta samsvararvið hesa grein? Grundgevið.

### 19. GREIN: HUGSANAR- SKRIVI- OG TALIFRÆLSI

***ØLL SKULU VERA FRÆLS AT HAVA SÍNAR ÁSKOÐANIR OG BERA TÆR FRAM UTTAN FORÐAN, OG AT SØKJA SÆR OG BREIÐA ÚT VITAN OG HUGSANIR ÍGJØGNUM HVØNN BOÐMIÐIL, SUM VERA SKAL, OG ÓHEFT AV LANDAMARKI.***

A. Hava allir Føroyingar sama rætt at koma fram at í fjølmiðlunum ( t. e. høvi til at siga sína hugsan)?

Á. Hvørjar avmarkingar halda tit eiga at verða settar ímóti hugsanar- og talifrælsinum?

B. Hvussu er í menningarlondum? Sleppa tey framat at siga vælferðarlondunum sína hugsan? Sleppa tey nóg væl framat í miðlunum?

D. Í mongum londum verða høvundar handtiknir og bøkur teirra bannaðar. Hvussu ber tað til? Hvat vita tit um Salman Rushdie og Taslima Nasrin? Roynið og fáið tilfar um tey.

Ð. Eru nakrar bøkur bannaðar í Føroyum?
Hvørjar?
Hví eru tær bannaðar?
Skulu tær vera bannaðar?

## 20. GREIN: RÆTTUR AT GANGA SAMAN Í FELAGSSKAP

***1. ØLL HAVA RÆTT TIL FRÍTT OG Á FRIÐARLIGAN HÁTT AT KOMA SAMAN OG TAKA SEG SAMAN Í FELAGSSKAPIR.***
***2. EINGIN KANN VERÐA NOYDDUR AT VERA LIMUR ÍFELAG.***

A. Finnið dømi um einstaklingar/felagsskapir og lond, sum hava stríðst siðiliga og áhaldandi fyri stórmálum. Hvørja mótstøðu hava tey oftast fingið?

Á. Kunnu tit vísa á við dømum úr søguni, har einstaklingar ella felagsskapir verða noydd at verða limur í felagsskapum?

## 21. GREIN: FÓLKARÆÐILIG RÆTTINDI

***1. ØLL HAVA RÆTT TIL AT TAKA LUT Í STJÓRN LANDSSINS, ANNAÐHVØRT BEINLEIÐIS ELLA GJØGNUM FRÍTT VALDUMBOÐ.***
***2. ØLL HAVA RÆTT TIL SOMU ATGONGD AT EMBÆTUM OG ALMENNUM STØRVUM I LANDI SÍNUM.***
***3. FÓLKSINS VILJI SKAL VERA STØÐI UNDIR STJÓRNARINNAR VALDI; HESIN VILJI SKAL VERÐA BORIN FRAMVIÐ ÁVÍSUM MILLUMBILUM OG RÆTTILIGUM VALUM VIÐ ALMENNUM OG JØVNUM VALRÆTTI, OG SKULU VERÐA FRAMD VIÐ LOYNILIGARI ATKVØÐING ELLA SAMSVARANDI FRÆLSUM VALHÁTTUM.***

A. Eru lond nú á døgum, har fólk ikki hava hendan rætt?

Á. Henda Yvirlýsing kom í 1948. Hvussu var støðan tá?
Teknið heimskort frá hesi tíðini. Litið tey lond, sum ikki høvdu sjálvræði og sjálvavgerðarrætt.

B. Heldur tú, at tú hevur ávirkan á stjórnarviðurskiftini í tínum landi, so at stýrt verður, sum tú heldur tað eigur at vera? Eigur tú lut í at leggja til rættis samfelagið, tú ert í?

D. Hava útlendingar búsitandi í Føroyum atkvøðurætt?

Ð. Hvør her á landi hevur ikki atkvøðurætt?

## 22. GREIN: FÍGGJARLIG, SOSIAL OG MENTANARLIG RÆTTINDI

***ØLL HAVA SUM FELAGSBORGARAR RÆTT TIL FELAGSLIGA TRYGD OG KUNNU KREVJA, AT TEY BÚSKAPARLIGU, SOSIALU OG MENTANARLIGU RÆTTINDI, SUM ERU NEYÐUG FYRI TEIRRA VIRÐING OG FRÍA MENNING AV PERSÓNLEIKANUM, VERÐA FRAMD VIÐ TILTØKUM INNANLANDS OG Í ALTJÓÐA SAMSTARVI OG Í SAMSVARI VIÐ SKIPAN OG TILFEINGI Í HVØRJUM LANDI.***

A. Hvussu skilja tit hugtøkini "sosial trygd" og "mentanarlig rættindi"? Grundgevið við dømum.

Á. Hví eru fíggjarligu, sosial og mentanarligu rættindini so umráðandi, at tey í 1966 verða samtykti í serligum sáttmála (sum er bindandi)?

B. Berið saman við viðurskiftini nú á døgum, bæði í Føroyum og í altjóða samanhangi.

§

**G.G. Tað hevur týdning, at gera greitt fyri næmingunum, at øll rættindini hanga saman, og at tey ikki kunnu raðfestast. Tí skal altíð eisini vísast til alla heimsyvirlýsingina, tá einstakar greinar verða umrøddar. (Rættindini eru sínamillum tengd (interdependence).**

## 23. GREIN: ARBEI SRAETTINDI

***1. ØLL EIGA RÆTT TIL ARBEIÐI, TIL FRÍTT AT VELJA STARV, TILRÆTTVÍS OG HÓSKANDI ARBEIÐSLÍKINDI OG TILVERND FYRI ARBEIÐSLOYSI.***

***2. ØLL HAVA UTTAN MISMUN RÆTT TIL SOMU LØN FYRISAMA ARBEÐI.***
***3. EIN OG HVØR, SUM ARBEIÐIR, HEVUR RÆTT TIL RÆTT-VÍSA OG HÓSKANDI SAMSÝNING, IÐ TRYGGJARTEIMUM EINA MANNSØMILIGA TILVERU, OG HAR-UMFRAMT UM NEYÐUGT AÐRA ALMENNA VERND.EIN OG HVØR HEVUR RÆTT TIL AT STOVNA OG GERASTLIMUR Í YRKISFELAG TIL AT VERJA SÍNI ÁHUGAMÁL.***

A. Lúka vit her á landi treytirnar í 1. stykki? Hvussu íheiminum annars?

Á. Verður goldin sama løn fyri sama arbeiði í Føroy-um nú í tíðini? Hyggið at lóg og veruleika.

B. Hvat halda tit um fakfeløg?

D. Vita tit um lond, har ið fakfeløg eru bannað?Ð. Vita tit dømi um, at fakfelagsviðtøkur verða ikkigóðtiknar/virdar?

## 24. GREIN: FRÍTÍÐARRÆTTUR

***ØLL HAVA RÆTT TIL HVÍLD OG FRÍTÍÐ, HAR UPPÍ RÍMILIGA AVMARKING AV ARBEIÐSTÍÐINI OG FRÍTÍÐ VIÐ LØN VIÐ ÁVÍSUM MILLUMBILUM.***

A. Hvørjar lógir galda fyri arbeiðstíð og frítíð í Føroyum?

Á. Berið saman við so mong lond, sum til ber, arbeiðstíð og frídagar í einum ári. Setið upp hagtø og latið landið, sum hevur festar frídagar standa ovast og skipið síðan londini, hvørt eftir øðrum alt eftir, hvussu mangar frídagar tey hava.

B. Hetta kann tykjast sum sjálvsagdur rættur. Hví er hann tikin við?

**G.G. Tað hevur týdning, at gera greitt fyri næmingunum, at øll rættindini hanga saman, og at tey ikki kunnu raðfestast. Tí skal altíð eisini vísast til alla heimsyvirlýsingina, tá einstakar greinar verða umrøddar. (Rættindini eru sínamillum tengd (interdependence).**

## 25. GREIN: MANNSØMILIG KOR

***1. EIN OG HVØR HEVUR RÆTT TIL LÍVSUMSTØÐUR, IÐ TRYGGJA HEILSU OG VÆLVERU, HAR UPPI Í MAT, KLÆÐI, BÚSTAÐ OG HEILSURØKT OG ALMENNAR TÆNASTUR OG RÆTT TIL TRYGD VIÐ MØGULIGUM ARBEIÐSLOYSI, SJÚKU, ÓARBEIÐSFØRI, MISSI AV MAKA, ALDRI ELLA AÐRARI SKERJING AV VINNU-MØGULEIKUM ORSAKAÐ AV UMSTØÐUM, SUM HANN/HON IKKI HEVUR RÆÐI Á.***
***2. MØÐUR OG BØRN HAVA KRAV UM SERLIGA UMSORGAN OG HJÁLP. ØLL BØRN, ANNAÐHVØRT TEY ERU FØDD Í HJÚNALAGI ELLA UTTAN, NJÓTA SOMUALMANNAVERND.***

A. Skiftið orð um vinnuloysið, íbúðaviðurskiftini og heilsuverkið í Føroyum. Lúka vit treytirnar?

Á. Berið saman heilsuverkið í Føroyum og í USA.

B. Hyggið at 2. stykki.
Halda tit tað vera rætt, at móðir og barn skulu hava serliga umsorgan og hjálp? Grundgevið.

D. Hvussu kann fíggjarpolitikkur ídnaðarlanda umboða brot á mannarættindini móti menningarlond-unum?
(M.a. rávørubýti – tilfeingið rættvíst býtt.)

## 26. GREIN: ÚTBÚGVINGARÆTTINDI

*1. ØLL HAVA RÆTT TIL ÚTBÚGVING. ÚTBÚGVINGIN SKAL VERA ÓKEYPIS, Í HVUSSU ER Á BYRJANAR- OG UNDIRSTØÐUSTIGI. UNDIRVÍSING Á BYRJANARSTIGI SKAL VERA SKYLDUBUNDIN. TØKNILIG OG YRKISLIG ÚTBÚGVING SKAL STANDA ØLLUM Í BOÐI, OG ØLL SKULU EFTIR FØRIMUNI HAVA SOMU ATGONGD AT HÆGRI UNDIRVÍSING.*
*2. UNDIRVISINGIN SKAL MIÐA ÍMÓTI AT FULLMENNA PERSÓNLEIKA EINSTAKLINGSINGS OG AT STIMBRA VIRÐINGINA FYRI MANNARÆTTINDUM OG FRÆLSI. HON SKAL FREMJA FATAN, TOLSEMI OG VINALAG MILLUM TJÓÐIR, FÓLKASLØG OG TRÚARBÓLKAR, OG SKAL FREMJA VIRKI SAMEINDU TJÓÐANNA FYRI AT VARÐVEITA FRIÐIN.*
*3. FORELDUR HAVA FYRSTA RÆTT AT VELJA, HVAT SLAG AV UNDIRVÍSING SKAL VERÐA GIVIN BØRNUM TEIRRA.*

A. Lýkur føroyska skúlaverkið eftir tykkara hugsan og royndum krøvini í hesi gein?
Er tað ikki so, hvat kunnu vit gera?

## 27. GREIN: LISTARLIG, VÍSINDALIG OG ANDLIG RÆTTINDI

*1. ØLL HAVA RÆTT TIL FRÍTT AT TAKA LUT Í MENTANARLÍVI Í SAMFELAGNUM, AT NJÓTA LIST OG EIGA LUT Í FRAMBURÐI VÍSINDA OG ÁGÓÐUM TEIRRA.*
*2. ØLL HAVA RÆTT TIL VERND AV ANDALIGUM OG EVNISLIGUM ÁHUGAMÁLUM Í SAMBANDI VIÐ EITT OG HVØRT VÍSINDALIGT, BÓKMENTALIGT ELLA LISTARLIGT VERK, SUM AVVARÐANDI HEVUR GREITT ÚR HONDUM.*

A. Vita tit dømi um, at rættindini í 1. stykki verða ikki vird?

Á. Gagnar øll vísindalig gransking mannaættini?

B. Skiftið orð um, at føgur og sjónbond verða eftirgjørd ólógliga (piratframleiðsla) Hvør er orsøkin til, at slík endurgerð kann elva til handilskríggj millum Kina og USA? Hvat hevur ólóglig endurgerð við mannarættindi at gera?

## 28. GREIN: FRIÐUR

*ØLL HAVA RÆTT TIL SAMFELAGS- OG ALTJÓÐA SKIPAN, HAR TEY RÆTTINDI OG FRÆLSI, IÐ NEVND ERU Í HESI YVIRLÝSING, KUNNU VERÐA FRAMD ÚT Í ÆSIR.*

A. Her verður sagt, at „Øll hava rætt til samfelags- og altjóða skipan“. Hvussu skal tað skiljast?

Á. Ein lýsing av hugtakinum friður er, „at ikki verður framdur, hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis harðskapur“.
Hvat verður meint við?
Kann „friður“ verða orðaður øðrvísi?

B. Skrivið lista við „friðarligum londum“. Havið í huga, at londini, hvørki mega fremja beinleiðis ella óbeinleiðis harðskap. Hyggið í heimsatlasið.

D. Hvussu kunnu tit vera uppií at skapa ein friðarligan heim?

## 29. GREIN: UM SKYLDUR OG ÁBYRGD

***1. ØLL HAVA SKYLDUR FYRI SAMFELAGNUM; Í TÍ EINANS ER FULL OG FRÆLS MENNING PERSÓNLEIKANS GJØRLIG.***
***2. SAMFELAGSBORGARAR SKULU VIÐVÍKJANDI RÆTTINDUM OG FRÆLSI EINANS VERÐA BUNDNIR AV AVMARKANUM, SUM ERU SETTAR Í LÓGUM VIÐ TÍ Í HYGGJU AT TRYGGJA VIÐURKENNING AV OG VIRÐING FYRI FRÆLSI OG RÆTTINDUM HJÁ ØÐRUM OG TIL TESSAT LÚKA RÆTTVÍS KRØV UM SIÐALAG, ALMENT SKIL OG VÆLFERÐ ALMENNINGSINS Í FÓLKARÆÐISSAMFELAG.***
***3. HESI RÆTTINDI OG FRÆLSI MEGA Í ONGUM FØRI VERÐA INT Í MÓTSTØÐU VIÐ ENDAMÁL OG GRUNDREGLUR SAMEINDU TJÓÐANNA.***

A. Her verður dentur lagdur á skyldur okkara. Hvussu langt eiga skyldur okkara at røkka fyri grannanum, landi og heimssamfelagnum?

Á. Hvussu mikið fyrilit skulu vit hava við einstaklinginum, tá ið tað kann verða til ampa fyri felagsskap ella øvugt? Hugsið tykkum støður, har ið hetta kann elva til stríð.
Hvussu kann sleppast undan tí?

B. Hvørja ábyrgd og hvørjar skyldur hava tit fyri heimi og skúla?

## 30. GREIN

***EINKI Í HESI YVIRLÝSING EIGUR AT VERÐA TULKAÐ TANN VEG, AT NØKRUM RÍKI, BÓLKI ELLA EINSTAKLINGI VERÐUR LOYVT AT GERA NAKAÐ, IÐ MIÐAR ÍMÓTI AT BEINA FYRI NØKRUM AV TEIMUM MANNARÆTTINDUM, SUM HER ERU TALD.***

A. Eru felagsskapir, rørslur, lærur ella annað, sum ganga ímóti 30. grein?

G.G. Tað hevur týdning, at gera greitt fyri næmingunum, at øll rættindini hanga saman, og at tey ikki kunnu raðfestast. Tí skal altíð eisini vísast til alla heimsyvirlýsingina, tá einstakar greinar verða umrøddar. (Rættindini eru sínamillum tengd (interdependence).